# Tómt tos frá Tobba

**Torbjørn Jacobsen, fólkatingsmaður, leggur donsku stjórnina og sendistovuna í Oslo undir at hava trýst Thorvald Stoltenberg til at taka seg úr kanningarnevndini hjá Norðuratlantsbólkinum. Tí er als einki hald í, sigur uttanríkisráðið**

KANNING
*Edvard Joensen*


*Torbjørn Jacobsen leggur donsku sendistovuna í Oslo undir at hava lagt trýst á Thorvald Stoltenberg fyri á tann hátt at forpurra kanningina av hernaðarmálum í Útnorði*

– Thorvald Stoltenberg varð trýstur av donsku stjórnini og Føroya Javnaðarflokki at taka seg aftur, sigur Torbjørn Jacobsen. Stjórnin hevur als ikki verið uppi í hasum yvirhøvur, sigur uttanríkismálaráðið. Tvætl, sigur Jóannes Eidesgaard.

Bæði danska uttanríkismálaráði og formaðurin i Føroya Javnaðarflokki avsannað púra at hava lagt nakað trýst á Thorvald Stoltenberg, sum Torbjørn Jacobsen, fókatingsmaður, vil vera við.

Málið snýr seg um kanningarnevndina, sum Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi kunngjørdi, at Thorvald Stoltenberg skuldi vera limur í.

## Mistak

Heldur enn Lars Emil Johansen, fólkatingsmaður, hevur Torbjørn Jacobsen ikki aðra frágreiðing enn, enn, at alan man vera um eina misskiljing, tá hann verður spurdur, hví føroyingar ikki fingu at vita, at Thorvald Stoltenberg kortini ikki skuldi kanna hernaðarmál í Útnorði.

Fyri at skjálprógva, at tað, sum Thorvald Stoltenberg segði við Sosialin í seinastu viku, var ósatt, sendi Norðuratlantsbólkurin út eitt tíðindaskriv, har brøv vóru við, sum skuldu mótprógva tí, sum Stoltenberg segði.

Men hesi skjølini vísa ikki petti annað enn, at tað, sum Stoltenberg segði, var rætt.

Thorvald Stoltenberg váttaði fyri Sosialinum, at hann var biðin um ráðgeving í utanríkispolitiskum málum og hevði játtað. Seinni, tá hann fekk arbeiðssetningin at vita, tók hann ta játtanina aftur.

Hóast hetta, varð kunngjørt, at hann skuldi vera við, men ongantíð kunngjørt, at hann hevði tikið tilsøgnina aftur.

Tað kom ikki fram fyri føroyska almenningin, fyrr enn Sosialurin skrivaði tað í seinastu viku. Hóast tað, at tað væl fyrr varð kunngjørt í grønlendskari pressu av grønlendska fólkatingsmanninum Lars Emil Johansen.

Lars Emil Johansen segði við Sosialin, at tað var ein misskiljing, at tað ikki var kunngjørt í Føroyum samstundis sum í Grønlandi.

Eftir at tíðindaskrivið frá Norðuratlantsbólkinum varð kunngjørt, vendi Sosialurin sær til Torbjørn Jacobsen, fólkatingsmann við tí greiða spurninginum, um talan var um eitt »forsømilsi við vilja«, tí tað leið so væl til løgtingsval i Føroyum, at skilabest var at gloyma hendan frensin.

Men soleiðis er ikki, segði Torbjørn Jacobsen. Hann helt fast við, at talan var bara um eina misskiljing, sum hevði gjørt, at einki varð sent føroysku pressuni.

Fyrr hevur grundgevingin hjá Norðuratlantsbólkinum fyri, at Stoltenberg tók seg aftur, verið tann, at hann metti arbeiðsbyrðuna ov tunga.

Um grundina til, at Stoltenberg hevði tikið seg aftur, segði Torbjørn Jacobsen, tá Sosialuirn tosaði við hann mikudagin, at Stoltenberg varð lagdur undir trýst av donsku stjórnini, sum hevði brúkt donsku sendistovuna í Oslo til at syrgja fyri, at hann tók játtan sína aftur. Og kanska var Føroya Javnaðarflokkur eisini innblandaður, segði hann.

## Heilt burturvið

Sosialurin vendi sær til danska uttanríkismálaráðið, sum umsitir sendistovurnar uttanlands, at vita, hvat var í hesum orðunum há Torbirni Jacobsen.

Uttanríkismálaráðið brúkti ein dag at kann málið hjá donsku sendistovuni í Oslo og hjá skrivstovuni í Uttanríkismálaráðnum, sum hava við Føroyar, Grønland og trygdarmál at gera.

Svarið frá Uttanríkismálaráðnum til Sosialin var heilt greitt, at hvørki Uttanríkismálaráðið ella danska sendistovan í Oslo nakrantíð høvdu verið uppi í hasum málinum yvirhøvur. Tað var stutt sagt púra ókent fyri tey, at hendan kanningarnevndin, sum Thorvald Stoltenberg skuldi sita í, nakrantíð hevði verið upp á tal.

Triðji parturin, sum sambært Torbirni Jacobsen kanska skuldi havt verið innblandaður, er Føroya Javnaðarflokkur.

Til tað svarar Jóannes Eidesgaard, floksformaður, stutt og greitt, at slíkt tos er tvætl.

Sosialurin royndi eisini at fáa eina viðmerking frá Thorvaldi Stoltenberg sjálvum. Men á skrivstovu hansara hjá norska Reyða Krossi varð sagt, at hann lá heima við lungnabruna og var ikki at hitta fyribils. Tó hevur hann fingið áheitan um teldupost um at gera viðmerkingar til tað Torbjørn Jacobsen nú førir fram.


Forespørgsel om deltagelse i arbejdsgruppe.

*Brævið, sum Lars Emil Johansen sendi millum øðrum Thorvaldi Stoltenberg, definerar ongan arbeiðssetning. Tí játtaði Stoltenberg í fyrstu syftu at vera við, men tók játtanina aftur, tá hann fekk arbeiðssetningin útgreinaðan*

# Gluntan fríggjar til føroyingar

**Norski dansibólkurin Gluntan hevur givið nýggja fløgu út og sigur samstundis í tíðindaskrivi, at teir kundu hugsað sær at sloppið aftur til Føroya**

TÓNLEIKUR

So eru teir aftur. Gluntan. Tó ikki við olju uttan við fløguni Flaks.

Í tíðindaskrivi, sum sent er í samband við fløguútgávuna, siga teir, at teir hava arbeitt við hesi fløguni í trý ár, og at sjálv innspælingin hevur tikið eitt heilt ár. Hetta er fyrsta fløgan, Gluntan gevur út í átta ár.

Fríggjað verður til føroyingar í tíðindaskrivinum, sum fortelur, at bólkurin hevur verið einar sjey – átta feðrir í Føroyum. Teir tykjast hava mist talið.

Samstundis veðrur sagt, at nú eru eini fimm – seks ár síðan, teir vóru her og spældu seinast, og at teir væl kundu hugsað sær at komið aftur.

Tónleikurin er lættur at kenna aftur. Hann líkist sær sjálvum, siga teir í tíðindaskrivinum.

*ej*




# Mogensen Band til Føroya

**Kopibólkurin Mogensen Band, sum kopierar John Mogensen, fer um vikuskiftið 19. og 20. apríl at spæla í Kagganum**

TÓNLEIKUR

Summir tónleikarar liva beinleiðis av at kopiera aðrar. Ein slíkur bólkur er danski Mogensen Band, sum spælir løg hjá navnframa John Mogensen, sum doyði fyri 25 árum síðan.

Hesin bólkurin, sum nú kemur hendanveg, er mannaður av royndum tónleikarum, sum í fleiri ár hava spælt í kendum bólkum sum til dømis Papa Bue's, Fessors Big City Band, Bjarne Liller og øðrum.

Sangarin, Poul Thaning, sigst vera so líkur John Mogensen á málinum, at fólk ikki hoyra mun. Og dentur verður lagdur á at fáa framførslurnar at ljóða júst, sum tað ljóðaði, tá John Mogensen sjálvur var á pallinum.

Serliga væl líkjast framførslurnar teimum hjá John Mogensen í tíðarskeiðnum 1971 til 1977, tá hann doyði, 49 ára gamal.

Sagt verður í tíðindaskrivinum, at tá bólkurin spælir, verður umhvørvið gjørt um til »københavnskan« vertshússtíl, sum tað var á teimum støðunum, John Mogensen dámdi best.

Tað er Atlantsflog, sum sponsorerar túrin hjá Mogensen Band til Føroya.

*ej*

# hygg & hoyr



**Frá fríggjadegi 12. apríl til hósdagin 18. apríl**

# Andglettur

*Valstríðið í sjónvarpinum byrjar mánakvøldið við Andglettinum. Hvørt kvøld í komandi viku verða floksformenninir settir í andglettin. Vertirnir, sum fara at tráspyrja floksleiðararnar eru Katrin Petersen og John Johannessen*



## Botnurin




## Stýrivolt




# Ferðslumarran

*Heri á Rógvi ummælir*



Ein vika burturímillum. Soleiðis kann tað væl sigast, nú eg skal siga nøkur orð um hvat og hvussu á loftmiðlasíðuni hesa seinastu vikuna.

Páskirnar vóru í orðsins rætta týdningi ein høgtíð hjá almennu loftmiðlunum. Tað var heilt øgiligt sum teir báðir stovnarnir gjørdu burturúr, tá Føroya fólk skuldu hava okkurt afturvið páskakjøtinum og páskaeggunum.

Taka vit fyrst almenna sjónvarpið, so var bæði Burturhugur og nakað størri á skránni. Tað var so gott sum eingin bilur úti, tá hesar báðar sendingarnar vóru í luftini, og páskamentanin var í hæddini.

Eisini varð borðreitt við eitt sindur av hvørjum hesa góðu páskadagar. Sendingar vóru nógvar og minni fjølbroyttar. Tað skortaði tó nógv við tí kristiliga tilfarinum. Har var eitt sindur av tí, men tað tóktist mestsum bara sett á skránna sum »pligtstof«, tí tað vóru jú páskir.

Lat tó tað vera sagt, at tað var stuttligt at vera forbrúkari av almennu varpunum um páskirnir. Nógvu sendingarnar góðu eitt rættiliga gott tilboð. Um alt nú var so ótrúliga gott er heldur ivasamt, men tað fyltist og hetta merkist, sæst og hoyrist.

Sum oftani fyrr, so verður vikan eftir eina tílíka høgtíð til eina viku burturímillum. Nógv krút er brúkt til sendingar, og battaríini skulu løðast aftur. Samstundis eru fyrireikingarnar eisini farnar ígongd til løgtingsvalið, ið verður síðst í mánaðinum.

Tískil kundi henda vikan verið lagd burturímillum, tí innihaldið var ikki tað stóra, og áhugin fyri at hyggja og lurta var at kalla eingin. Tað krevur nógv at vera kræsin.

**Ferðsla**

Eitt fyribrigdi, vit hava hoyrt nógv til hesa vikuna eins og aðrar vikur, er ferðslan. Av einari ella aðrari orsøk kunnu útvarpsrásir ikki fáa nokk av hesum góða evni. Sending omaná sending um alt hetta, sum er so ótrúliga spennandi við ferðslu.

Bæði Rás 2 og ÚF gera í ríkiligan mát burturúr ferðslu. Rás 2 hevur eina – onkuntíð tykjast tær sum fleiri – sendingar, sum bara snúgva seg um ferðslu. Útvarp Føroya hevur tikið táttin upp í morgunsendingunum.

Um tað eitur morgunsending ella okkurt annað er fyri sovítt líka feitt: tað er alt líka lítið spennandi.

Tað er rætt og slætt ófatiligt, at fólk kunnu gera so nógv burturúr hesari góðu ferðsluni. Bilarnir, lyktirnar, gonguteigarnir v.m. verða yvireksponerað upp á grovasta manér. Tá evnið er so ófatiliga lítið áhugavert, so krevur hetta nakað av sendingunum, men teir hava framvegis upplesandi løgreglumenn og ferðslumyndugleikar í hásæti. Sendingarnar verða ótrúliga tungar at lurta eftir, tá formurin er so stívur í tí.

Tilfarið er óivað ætlað sum fyribyggjandi, og tað er ikki av leið, men tað skal nú einaferð meira til. Kanska country tónleikurin er savnandi eindin hjá lurtarum kring landið?

Hetta gevur tó ikki hug til annað enn at skifta rás ella sløkkja fyri útvarpinum. So kann tað vera fyribyrgingin.

Tað virkar mestsum sum gonguferðir í myrkri Bølamyrkrið er eisini stuttligari at uppliva og lurta eftir.

**List**

Ein sendirøð, sum hevur koyrt eina tíð, er sendirøðin um føroyska list. Eg havi sæð fleiri partar av hesi sending, og tað líkist einari meining um tær.

Sendingarnar byggja á arbeiðið hjá vertinum, Bárði Jákupssoni. Tað er heldur ikki vitan, ið vertinum vantar, og vit sleppa víða um í listaheiminum í Føroyum. Eftir at hava lisið bøkur hjá Bárði og øðrum er tað rættiliga áhugavert at hyggja at sendingunum, sum eru hóskandi útlegging av samfelagssøgu.

Hóast formurin mest líkist einari vánaligari sjónleikarasetu, so eru sendingarnar fínar. Evnið í sær sjálvum er spennandi, og tað verða sendingarnar so eisini.

## Highlander III




## Party Zone

